## Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál- munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 8 | 5 - 1 - 2 | 17 | 7 | 10 | 16 |
| 2 | NSÍ | 9 | 4 - 4 - 1 | 18 | 8 | 10 | 16 |
| 3 | HB | 8 | 4 - 3 - 1 | 20 | 10 | 10 | 15 |
| 4 | KÍ | 8 | 4 - 2 - 2 | 9 | 13 | -4 | 14 |
| 5 | GÍ | 8 | 3 - 3 - 2 | 12 | 10 | 2 | 12 |
| 6 | B68 | 8 | 2 - 5 - 1 | 6 | 5 | 1 | 11 |
| 7 | EB/ Streymur | 8 | 2 - 4 - 2 | 12 | 14 | -2 | 10 |
| 8 | FS V | 8 | 2 - 1 - 5 | 9 | 18 | -9 | 7 |
| 9 | VB | 8 | 1 - 3 - 4 | 9 | 16 | -7 | 6 |
| 10 | Skála | 9 | 1 - 0 - 8 | 6 | 17 | -11 | 3 |

## Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Andrew av Fløtum | HB | 6 |
| Sonni L. Petersen | NSÍ | 6 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 5 |
| Birgir Jørgensen | VB | 5 |
| John Petersen | B36 | 5 |
| Heðin á Lakjuni | B36 | 4 |
| Karsten From | HB | 4 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 4 |
| Helgi L. Petersen | NSÍ | 4 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 3 |
| Rúni Nolsøe | HB | 3 |
| Milan Kulic | VB | 3 |
| Jákup á Borg | B36 | 2 |
| Jens Kristian Hansen | B36 | 2 |
| Sjálvmál | B68 | 2 |
| Súni Fríði Johannesen | B68 | 2 |
| Magni á Lakjuni | EB/S | 2 |
| Egil á Bø | EB/S | 2 |
| Sorin Anghel | EB/S | 2 |
| Elfinn Ørvarodd | FSV | 2 |
| Eyðfinn Fjalsbak | FSV | 2 |
| Jens Erik Rasmussen | FSV | 2 |
| Bartal Eliasen | GÍ | 2 |
| Símun Samuelsen | GÍ | 2 |
| Súni Olsen | GÍ | 2 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 2 |
| Rókur F. Jespersen | HB | 2 |
| Atli Danielsen | KÍ | 2 |
| Jústinus R. Hansen | NSÍ | 2 |
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ | 2 |
| Bogi Gregersen | Skála | 2 |
| Allan Mørkøre | B36 | 1 |
| Sjálvmál | B36 | 1 |
| Sonni Johansen | B36 | 1 |
| Klæmint Matras | B36 | 1 |
| Dánjal Hansen | B68 | 1 |
| Jóan Petur Poulsen | B68 | 1 |
| Gert Hansen | EB/S | 1 |
| Marni Djurhuus | EB/S | 1 |
| Ronnie Samuelsen | EB/S | 1 |
| Clayton Soares | FSV | 1 |
| Kim Poulsen | FSV | 1 |
| Silva | FSV | 1 |
| Hans Pauli Petersen | GÍ | 1 |
| Hallur Danielsen | HB | 1 |
| Símun Eliasen | HB | 1 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 1 |
| Allan Joensen | KÍ | 1 |
| Ove Nysted | KÍ | 1 |
| Símin Joensen | KÍ | 1 |
| Brynjólvur Nielsen | NSÍ | 1 |
| Messias Perreira | NSÍ | 1 |
| Óli Hansen | NSÍ | 1 |
| Sjúrður Jacobsen | NSÍ | 1 |
| Palli Augustinussen | VB | 1 |
| Arnhold Berg | Skála | 1 |
| Hanus Thorleifsson | Skála | 1 |
| Pauli G. Hansen | Skála | 1 |



*Jens Petur Brattalíð bleiv skaddur undan dystinum millum Skála og FS Vágar og kundi tí ikki døma*

# Langa leið til onga nyttu

**Jens Petur Brattalíð varð skaddur undir upphitingini á Skála, og so vórðu boð send eftir næstformanninum í FSF**

SKADDUR DÓMARI
*Jóannes Hansen*

Tað gongst ikki altíð, sum tað hevur verið roknað við og ætlað. Hetta eru tað so nógv dømi um, og fótbóltsdómarin Jens Petur Brattalíð kann skriva undir uppá, at mikudagurin royndist ikki soleiðis hjá honum, sum hann framman undan hevði roknað við.

Jens Petur var settur at døma á Skála mikukvøldið. Hann fór úr Vági tíðliga á degnum, og alt gekk sína gongd, inntil hann og linjuverjarnir báðir vóru í holtur við upphitingina. Tá fekk hann ein vøddaskaða, og har var einki at gera. Dómarin var noyddur at taka seg aftur, og so vóru góð ráð dýr.

Boð vórðu send til Gøtu, har næstformaðurin í FSF og royndasti dómarin í 1. deild, Niklas á Líðarenda, býr. Hann skuldi yvir at Skála at vera eygleiðari. Men hann hevði ikki fyrireikað seg til at døma.

– Eg hevði akkurát fingið mær ein góðan nátturðabita, tá ið teir ringdu. Eg gjørdi skjótt av, og eg haldi, at tað gekk væl. Men tað er ikki komið fyri áður, at eg havi etið eina orduliga máltíð so stutt undan dystarbyrjan, har eg skal vera dómari, sum eg gjørdi mikukvøldið, sigur Niklas.

Jens Petur Brattalíð pakkaði taskuna og fyrrapartin í gjár kom hann suður aftur til Vágs av fótbóltsferð, men uttan at hann hevði útrættað tað, sum hann var settur til at gera, og sum hann hevði ætlað sær at gjørt. Vónandi fer tað at gangast honum betri, tá ið hann næstu ferð skal um fjørðin í fótbóltsørindum.



# Mentanarnátt í SMS

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin hava handlarnir í SMS opið til kl. 24.00. Nógv undirhald verður á pallinum á Torginum.

Fríggjadagin í verður árliga mentanarnáttin hildin. Hetta er triðja árið á rað, vit halda mentanarnátt. Umframt at handlarnir hava opið til kl. 24.00, verður ein rúgva av undirhaldi av alskyns slagi á pallinum á Torginum. Undirhaldið byrjar longu kl. 14.00, tá ið Ølholm Folkedansere úr Danmørk fara at dansa uttan fyri SMS. Donsku dansararnir eru gestir hjá Vága Dansifelagi, sum hesa fyrstu vikuna í juli er vertur fyri norðurlendskari dansistevnu á Giljanesi í Vágum. Tað, tey fara at sýna fram í SMS fríggjadagin, eru vanligir danskir fólkadansir. Spælimansorkestur spælir undir, meðan dansað verður. Viðrar ikki at dansa úti, verður farið innum. Aftan á framførsluna hjá fólkadansarunum verður undirhald annan hvønn tíma á pallinum. Kl. 16.00 fara næmingar í Tórshavnar Musikkskúla at spæla lættan tónleik.

Kl. 18.00 fara tey bæði, Angela og Hannibal, á pallin. Tey eru langt síðan vorðin eitt av afturvendandi tiltøkunum, sum vit hava, tá ið undirhald er fyri børn. Og vit hava eisini fult hús, hvørja ferð tey koma á pallin. Og tað vóna vit, at tað eisini verður fríggjakvøldið.

Í sambandi við Jazzfestivalin, sum er í Havn í hesum døgum, vitjar føroyski bólkurin, Gospel Trioin. Tey trý, sum manna bólkin, eru Bo Isholm, gittara/bass, Eirikur Skála, klaver/saksofon og Sigrið Sivertsen, sang. Eftir at hava spælt saman umleið tvey ár, eru hesir dugnaligu tónleikararnir vorðnir til ein væl umtóktan bólk, sum hevur spælt ymsastaðni í Havn, m.a. á Café Natúr og í Norðurlandahúsinum. Skráin hjá teimum er lættur og kendur tónleikur, m.a. hjá Stevie Wonder umframt gospel og djasstónleikur. Gospel Trio´in spælir á pallinum kl. 20.00.



Kl. 23.00 fara teir fýra úr All That Rain at enda kvøldið, so tað stendur eftirí. Í sambandi við fyrstu mentanarnáttina fyri trimum árum síðan, vóru teir tað stóra navnið. Teir høvdu júst givið fløgu út, so Torgið var stúgvandi fult í sambandi við framførsluna. Síðan er bólkurin broyttur nakað. Teir eru nú fýra mans, og teirra millum er nýggjur sangari. All That Rain fara at spæla kend løg, sum eru á hittlistunum í dag. Kanska enda teir við onkrum kendum Beatlestónum, nú ið tiltakið vesturi í Vágum í mei eydnaðist so væl.

Umframt nógva undirhaldið, hava handlarnir í SMS serliga góð tilboð at bjóða viðskiftafólkum sínum.

# Dansistevna í Vágum

**Hósdagin klokkan 10 fyrrapartin verður norðurlendska dansistevnan á Giljanesi sett. Setanin er almenn**

TÍÐINDASKRIV
*Vága Dansifelag*

Norðurlendska dansistevnan, sum hildin verður í Vágum frá 1. til 7. juli, verður sett á Giljanesi hósdagin klokkan 10.00. Jørgen Niclsne, løgtingsmaður, fer at seta stevnuna.

Tað luttaka einir 80 norðurlendskir dansarar á stevnuni. Teir eru umframt vertirnar úr Vága Danifelag, gestir í Danmark og Noreg.

Undir almennu setanini fara luttakararnir at dansa á skúlaplássinum á Giljanesi. Seinnapartin fara tey at dansa í bygdunum í Vágum. Byrjað verður í Miðvági og Sandavági klokkan 15.00. Kokkan 17 fara tey at dansa í Sørvági og Bø. Feløgini fara ikki at dansa saman, men spreiða seg um oynna.

Fríggjadagin verður dansað í Havn. Leygardagurin er settur av til útferð, og tað verður eftir, sum veðrið er, hvar farið verður. Men ivaleyst verður eisini dansað har, tey fara at vitja.

Sunnudagin fara tey til Gásadals, og tá verður eisini dansað uppi í Dalinum.

Sunnukvøldið klokkan 19.30 er almenn framførsla á Giljanesi, har allir luttakaranir fara at sýna fram tað, tey hava vant til hesa stevnuna.

Vága Dansifelag sigur, at stevnan er fyri øll, sum áhugað eru, og teir limir og onnur, sum hug hava koma til tiltøkini, sum eru um kvøldini, meðan stevnan er, eru vælkomnir, hóast teir ikki annars luttaka á stevnuni.

# Ráðstevna um íslendsk og føroysk viðurskifti

FRÆNDAFUNDUR
*Tíðindaskriv*

Heimspekideild Háskóla Íslands og Fróðskaparsetur Føroya skipa fyri ráðstevnu, Frændafundi, í Reykjavík 19. og 20. juni í 2004, hini fimtu, sum hesir stovnar halda í felag. Á ráðstevnuni verður røtt um ymisk evni, sum viðvíkja Føroyum og Íslandi. Meginparturin av fyrilestrunum, sum verða fluttir á ráðstevnuni, hevur støði í rannsóknum, sum granskarar í báðum londunum hvør í sínum lagi fáast við.

Harafturat verða granskarar bodnir at bjóða fram fyrilestrar um evni, sum viðvíkja londunum báðum. Føroyingar halda fyrilestur á føroyskum og íslendingar á íslendskum. Hvør fyrilestur varir um 20 minuttir.

Við hesum verður lýst eftir tilboðum um at halda fyrilestrar á ráðstevnuni. Tey, sum áhuga hava, verða biðin um at lata frá sær stuttan samandrátt av fyrilestri sínum.

Teir granskarar, sum longu nú eru bidnir at halda fyrilestrar, eru:

Um framtøku í landbúnaði: Jónas Jónasson, fyrrverandi búnaðarmálastjóri (Ísland) og Gunnar Bjarnason, landbúnaðarfrøðingur (Føroyar).

Um framtøku í sjóvinnu: Jón Þ. Þór, fyristøðumaður Rannsóknaseturs fyri sjóvinnu-søgu (Ísland) og Jóan Pauli Joensen, professari (Føroyar).

Um framtøku í ávísum landslutum seinastu árini: Unnur Dís Skaptadóttir, dosentur í mannfrøði á Háskóla Íslands (Ísland) og Gestur Hovgaard, ph.d. (Føroyar).

Um søguna hjá sertrúarsamkomum: Pétur Pétursson, professari í gudfrøði við Háskóla Íslands (Ísland) og Poul F. Guttesen, ph.d.-lesandi (Føroyar).

Um árin frá fleirtjóða hugmyndastevnum frá upplýsingarøld til fyrst í 20. øld: Ingi Sigurðsson, professari (Ísland) og Hans Andrias Sølvará, søgufrøðingur (Føroyar).

Føroyar og føroyingar í íslendskum bókmentum: Turið Sigurðardóttir, bókmentafrøðingur. Ísland og íslendingar í føroyskum bókmentum: Malan Marnersdóttir, bókmentafrøðingur.

Í fyrilestrunum verður dentur lagdur á samanburð millum íslendsk og føroysk viðurskifti.

Tilboð um fyrilestrar skulu verða latin Anfinni Johansen, Fróðskaparsetur Føroya, postsmoga 272, 110 Tórshavn, teldupostur: anfinnurj@setur.fo, í seinasta lagi 1. september 2003.

# Hørpukonsert við Gjógv

Konsert við hørputónleiki og sopransangi verður við Gjógv sunnudagin 13. juli. Joost Schelling spælir á hørpu og Joanna Johansen syngur. Tvær frumframførslur av føroyskum verkum fyri hørpu eru á skránni.

Konsertirnar, sum er tvær, verða í Gjáar kirkju sunnudagin 13. juli klokkan 15:00 og í Bygdarhúsinum klokkan 17:00. Samstundis verður høvið at síggja myndlist eftir Erik Schwarzbart, Ole Werner Munck og Anders Hjuler.

Frumframførdu verkini, sum bæði eru fyri hørpu, eru eftir Kristian Blak við heitinum "Harpan" og eftir Paula í Sandagerði við heitinum "Harpix".

Hørpuleikarin Joost Schelling er føddur í Hollandi, men býr í Beder í Danmark. Útbúgving hevur hann nomið á Vestjysk Musikkonservatorium, har hann tók endaliga diplomútbúgving í 1981. Síðani hevur Joost Schelling lisið í Onglandi og verið við á Masterclass-skeiðum. Í dag arbeiðir Joost Schelling sum free lance tónleikari í symfoniorkestrum í Danmark, Noregi



og Svøríki, spælir solo konsertir, kamartónleik, er við á kórkonsertum og undirvísir á Århus Musikskole.

Joanna Johansen er kend føroysk sopran rødd. Joanna, sum er av Strondum, er útbúgvin lærari og starvast í Eysturskúlanum í Havn. Hon hevur áður verið í starvi sum lærari í Danmark, har hon eisini hevur verið sanginstruktørur og havt privatundirvísing í sangi. Joanna hevur harumframt medvirkað í fleiri stórum tónleikatiltøkum og fløguútgávum í Føroyum og syngur í nýggja kórinum Tarira.

# Odd Fellow Ordanin í Tórshavn letur hurðarnar upp

TÍÐINDASKRIV

Í samband við Mentanarnáttina 2003 bjóðar losja nr. 1 Ambolturin, IOOF øllum áhugaðum at vitja losjuna á Grønlandsvegi nr. 45 millum kl. 19.00-23.00.

Nógv halda, at tað hendir nakað løgið og óhugnaligt í eini Odd Fellow losju, men tað heldur Edward Ingebrigtsen úr Vestmanna ikki. Sjálvur hevur hann verið limur síðan stovnanina í 1986. Føroyska losjan byrjaði í leigaðum hølum í Vestmanna, men tá hølini gjørdust ótíðarhóskandi, var støða tikin til at flyta til Havnar og ognin á Grønlandsvegi nr. 56 bleiv keypt til endamálið.

Odd Fellow Ordanin er ein altjóða felagsskapur, sum byggir á tey menniskjaligu virðini. Fyri at gerast limur í felagsskapinum krevst einki serstakt, fíggjarligt, politiskt ella átrúnaðarligt støði, ella annað sum skilir fólkið. Tær einastu treytirnar eru, at ein skal vera rættarliga myndugur, og at man trýr á eina hægri makt.

Limirnir verða kunnaðir við eina rúgvu av »etiskum« livireglum ið fremja sátt og semju millum menniskju í gerandisdegnum, og at, »ein tænir sær sjálvum best, sum hann tænir øðrum« og at »tú skal vera móti øðrum, sum tú vil hava onnur at vera móti tær sjálvum«. Odd Fellow Ordanin ber orð fyri at vera sera duldarfullur, men soleiðis er veruleikin als ikki, tað er ógvuliga lítið, ið ikki tolir dagsins ljós. Tó er okkurt smávegis, ið bert hoyrir til millum losjulimirnar, men soleiðis er tað eisini í privatlívinum.

Odd Fellow Ordanin er meira enn bert losjuarbeiði, tað røkkur eisini frá samkomum fyri eldri og sjúkum, til tað árligu gávuhandanina frá Stórlosjuni uppá 250.000 kr. til læknavísund.

Úr teimum ymisku grunnunum ið Odd Fellow felagsskapurin ræður yvir og innsavnaðum peningi millum brøður og systurlosjunar, verða eisini árliga lætnar milliónir av krónum til vælgerandi endamál. Til heystar vil eisini okkara losja nr. 1 Ambolturin geva gávur til somu endamál í Føroyum.

Á mentanarnáttini 2003 verður opið hús á Grønlandsvegi nr. 56 millum kl. 19 og 23, har øll eru hjartaliga vælkomin, at seta spurningar losjuni viðvíkjandi og eftir førimuni fáa hesar svaraðar.